# At droyma er at liva

Í Rákinum hesa ferð lesa vit um fólk, sum hava fylgt dreymum sínum. Vit lesa um listakvinnuna Rannvá Mortensen, sum flytur til India at mála. Um jogalæraran og vegatararnar, sum droyma um eitt sunnari lív og ein betri heim. Og vit lesa um, hvussu vit kunnu hjúkla um kærleikan í parlagnum, so vit varðveitahendan størsta dreymin av øllum, kærleikan.

Vinkonan, sum er fólkaskúlalærari, hevur seinastu mongu árini nomiðsær kravmikla útbúgvinguttanlands, umframt starvið sum lærari. Tí ferhon javnan av landinumí lestrarørindum. Spurdi hana, hvussu hon fekk ráð til hetta. Jú, hon leggir 1000 krónur í ein cigarkassa hvønn mánað. Hvørja ferð nóg nógvir pengar eru í kassanum, fer hon uttanlands á skeið! Hon droymir ikki bara um lívlanga menningog læring, men hevur sett sær fyri, at alt lívið skal vera ein avbjóðing.

Vón okkara er, at Rákið hesa ferð bæði kveikir dreymar, og ikki minst, eggjar til at gera teir til veruleika.



Anna, Dorit, Ragnhild, Rigmor, Inna og Gudny

**RÁKIÐ 2007**
**Postboks 76, 110 Tórshavn**
**Teldupostur:**
**post@sosialurin.fo**

**BLAÐSTJÓRN**
**Rigmor Dam**
**rigmor@sosialurin.fo**

**Inna Tørnroos**
**inna@sosialurin.fo**

**MYNDAMENN**
**Jens Kristian Vang**
**Álvur Haraldsen**

**LÝSINGAR**
**Gudny Langaard**
**Joan Abrahamsen**
**Henrietta Hammer**

**UMBRÓTING**
**Inna Tørnroos**

**ÚTGEVARI**
**Sp/f Sosialurin**

**Lagt til rættis:** Rigmor Dam & Inna Törnroos





Blusan og vesturin eru frá Hennes & Mauritz

## Grátt heyst

Grátt er tað nýggja svarta siga tey mótakunnigu. Í heyst skulu bæði troyggjur, buksur og jakkar helst vera gráir.

Vero Moda nýtir supermodellina Gisele Bundchen til at marknaðarføra sín gráa móta.

## Flúgvandi veskur



Síðani bretar steðgaðu yvirgangsmonnum, ið vóru á veg umborð á flogfør við spreingjievni i veskum, er tað blivið sera torført at taka vatn, krem, baðiskúm og annað flótandi umborð á flogfør.

Nógv okkara hava keypt dýrt krem, sum tollarin hevur tikið av trygdarávum.

Men nú er ein lítil loysn komin – toilettaskan One Litre – við tveimum fløskum og tveimum íløtum rúmar einum litri, ið er tann loyvda mongdin av vesku, ein fær tikið við umborð.

So nú er bara at fylla ta lítlu fløskuna og íløtini við tínum yndis kremi og luktilsi.

## Luksus Hennes & Mauritz

Erstatta HM tekstin við hendan - har vóru nakrir feilir í: COS - Collection of style er heitið á nýggjasta handlinum hjá mótaketuni Hennes & Mauritz.

Meðan Hennes & Mauritz er kent fyri at vera bíligir við lágari góðsku, skal COS vera lítlasystirin, sum selur betri góðsku og er eitt sindur dýrari.

Fyrsti COS handilin er longu latin upp í Regent Street í London, og bara í ár væntа tey at lata einar tíggju nýggjar COS handlar upp í Týsklandi, Belgia og Hollandi.

Nær vit í Norðurlondum fáa fyrsta COS handilin, sigur søgan einki um.





## Stuttligast at gera mat

Danmark, Svøríki, Noreg og Finnland eru øll á einum máli um, at tað er stuttligast at gera mat og at vatna urtapottarnar. Tað vísir ein kanning, sum elkketan Bosch Húsarhald – BSH hevur gjørt. Tey hava spurt fólk í Norðurlondum, hvat ið er stuttligast og keðiligast at gera í húsarhaldinum. Tað keðiligasta eru londini ikki líka samd um – í Danmark og í Noregi er tað keðiligasta arbeiðið í húsarhaldinum at rulla løk, meðan tað í Svøríki og í Finnlandi er at vaska ovn, køliskáp og frystiboks.

Soleiðis svaraðu danir spurninginum , hvat sum er keðiligast at gera:

1. Rulla løk.
2. Vaska ovnin, køliskáp og frystiboks.
3. Pussa vindeygu.
4. Vaska gólv.
5. Dustsúgva.

Soleiðis svaraðu danir spurninginum, hvat sum er stuttligast at gera:

1. Gera mat.
2. Vatna urtapottar.
3. Vaska klæði
4. Vaska upp.
5. Strúka klæði.

*Orgasma er eitt djúpt egoistiskt fyribrigdi – at koma í senn er ein myta!*

*Sitat: Karin Dahl, sexologur*